# Hans Fróði til Breiðablik

**Miðverjin flytir frá Fram í bestu deildini og til felagið í Kópavogi, sum spælir í næstbestu íslendsku deildini**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað hevur leingi verið greitt, at føroysku spælararnir, sum í ár spældu í Fram í Reykajvík, ikki fóru at halda fram í felagnum. Nú eru tað nógvar vikur síðani, at Fram boðaði frá hesum á heimasíðu sínari.

Enn er ikki greitt, hvar Fróði Benjaminsen fer at spæla næsta ár. Søgurnar m tann spurningin hava verið nógvar, men enn hevur einki verið at hoyrt frá Fróða.

Nú er greitt, at Hans Fróði Hansen fer at halda fram í íslendskum fótbólti. Hann flytir úr Fram og til Breiðablik. Tað vita íslendskir fjølmiðlar at siga. Talan er um felag í næstbestu deildini. Breiðablik er í Kópavogi, sum er dygst uttanfyri Reykjavík ella sum rættari er vorðin partur av íslendska høvuðsstaðnum.

Breiðablik flutti niður úr bestu deildini í 2001. Síðani hava teir verið í næstbestu deildini, og í ár endaðu teir á fjórða plássinum.

# Næstan eitt FCK lið á skaðalistanum

**Sunnudagin spældi meistaraliðið ógvuliga væl, men síðsta korterið kortsluttaði hjá teimum, og so fór AGF, sum er komið fram á fjórða plássið, úr Parkini við øllum stigunum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Brøndby er oddalið í superliguni, og leiðslan er meiri sannførandi nú, enn hon var undan vikuskiftinum. Leygardagin hevði Brøndby vitjan av Viborg, sum var næstovast. Heimaliðið hevði leikliga yvirvág, men gestirnir vardu væl, og teir høvdu eisini onkrar góðar møguleikar, sum teir misnýttu.

Brøndby hevði nógvar góðar málmøguleikar, men Viborg málverjin, Jesper Christiansen, stóð stinnur. Tí var tað serliga meint hjá honum, at stór villa málverjuvilla var orsøkin til sigursmálið hjá Brøndby. Svenski Johan Elmander, sum kom til Brøndby í summar, og sum ikki undan hesum dystinum hevði skorað mál, royndi seg úti frá, og Viborg málverjin misti bóltin afturum seg og í málið.

FCM flutti fram á næstovasta plássið. Teir vunnu 1-0 á heimavølli móti Herfølge, sum er dygst omanfyri niðurflytingar strikuna. Mohammed Zidan var sum ikki eina ferð málskjútti hjá FCM. Eftir dystarlok var nógv tosað og skrivað um sjónleikaraevnini hjá egyptiska álopsspælaranum hjá FCM. Hann var orsøkin til, at ein av miðverjunum hjá Herfølge miðskeiðis í 2. hálvleiki varð rikin av vøllinum. Summi vildu vera við, at tað var av órøttum. Men ikki øll vóru av hesi áskoðan.

AGF fór úr Parkini við øllum stigunum. Í 1. hálvleiki spældi FCK gestirnar sundur og saman, men teir fingu einki mál. Hjalte Bo Nørregaard legði miðskeiðis í 2. hálvleiki FCK framum við rimmar langskoti, og so tóktist tað skula koppa tann vegin, sum tað varð roknað við. Men AGF spílaði seg út síðsta korterið, og teir vunnu 3-2. Tað kom illa við hjá FCK.

Lagið í FCK er einki serligt. Umframt Toda Jónsson eru átta aðrar spælarar á skaðalistanum. Millum hesar eru álosspælararnir Zuma og Álvaro, og Peter Møller var leikbannaður sunnudagin og er tað eisini næstu ferð.

OB smurdi FCN av 7-1. Nú er FCN niðast. Hjá OB skoraði Steffen Højer fýra mál. Hann skoraði trý mikukvøldið og hevur sostatt í tveimum umførum skorað sjey mál. Hetta er tað sama talið, sum Ebbe Sand rakk, tá ið hann í 1997 setti met í superliguni. Fyri Brøndby skoraði hann sjey mál í tveimum dystum.

Randers slapp fyri fyrstu ferð, síðani teir fluttu upp, av aftasta plássinum, tá ið teir á heimavølli vunnu 4-0 móti Silkeborg. Silkeborg er dygst omanfyri niðurflytingar strikuna.

Hjá Esbjerg gongur tað einki serligt. Hesa ferð høvdu teir vitjan av AaB, sum spældi framúr væl og fór norður aftur eftir meginlandinum við 3-2 sigri.

# Framvegis á toppinum

**Bæði Frem og Horsens vunnu, meðan føroyski leikluturin ikki var serliga stórur í javnleikinum hjá Fremad Amager**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað gekk sum eftir ánni hjá bæði Horsens og Johan B. Hansen og hjá Frem og Jón Róa Jacobsen. Horsens vann 3-1 á Eysturbrúgv móti B93 og er framvegis oddalið. Frem vann 1-0 á heimavølli móti Vejle. Jón Rói Jacobsen spældi alla tíðina. Í 1. hálvleiki hevði Jón Rói tvær góðar royndir móti mótstøðumálinum.

Fremad Amager spældi málleysan javnleik í Gentofte móti HIK. Andrew av Fløtum spældi síðsta hálva tíman, og Hjalgrím Elttør spældi síðstu seks minutt-irnar.

# Innandurakapping í Keypmannahavn

**Komandi vikuskiftið skipar ÍF Føroyar fyri innandurakapping í Keypmannahavn**

ÚTISETAFELAG
*tíðindaskriv*

Seinastu árini hevur tað verið eitt afturvendandi tiltak, at ÍF Føroyar skipar fyri eini innandurakapping í fótbólti í danska høvuðsstaðnum. Og so verður eisini í ár. Kappingin verður bæði fyri menn og kvinnur, og leikt verður á hondbóltsvølli við girðing. Øll eru vælkomin at melda lið til, og kappingin byrjar leygardagin tann 13. november í Svanemøllen Hallerne á Østerbro.

Kostnaðurin er 500 krónur fyri hvørt liðið. Fýra leikarar eru á vøllinum í senn, og loyvt er at hava ein eykaleikara. Íroknað luttøkugjaldið er døgurði og ókeypis atgongd á Jacques alt kvøldið, um komið verður áðrenn klokkan 24.

Tilmelding fer fram hjá Kristian Eli Andersen á tlf. 26 36 60 57 og hjá Finn Mørk á tlf. 61 30 68 32 í seinasta lagi týsdagin 9. november.




## Skeið innan góðskutrygging í byggivinnuni (kvalitetssikring)

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Føroya Byggifrøðingafelag og Føroya Handverksmeistarafelag skipa fyri skeiði innan góðskutrygging í byggivinnuni.

Skeiðið er ætlað projekterandi byggifrøðingum, arkitektum, verkfrøðingum o.ø., arbeiðstakarum, byggi- og entreprenørfeløgum, handverksmeistarum o.ø. og byggiharrum.

**Skeiðið inniheldur m.a.:**
- Arbeiðshættir frá byggiharra til útboð
- Góðskutryggingarreglur
- Uppskotsgransking
- Projektkontrol
- Útboðskontrolplan
- Stýrihættir
- Stýriætlan
- Eftirlit
- Góðskutryggingarskipanin
- Góðskutryggingarhondbókin
- Bólkaarbeiði

Útgreinað skeiðsyvirlit kann heintast/síggjast á heimasíðuni – www.industry.fo

**Undirvísarar**
Undirvísarar á skeiðnum verða frá Vitus Bering Danmark.

**Skeiðsstaður og kostnaður**
Skeiðið verður á Hotel Føroyum tann 18. og 19. november 2004. Kostnaðurin fyri at luttaka er kr. 3000,- fyri hvønn íroknað mat og skeiðstilfar.

Skeiðsluttakarar kunnu bíleggja sær eitt kamar í sambandi við skeiðið fyri kr. 700,- íroknað morgunmat.

**Tilmeldingarfreist**
Freistin at tekna seg til skeiðið og at bíleggja kamar er 15. november 2004.

Tekning fer fram á www. industry.fo

R. C. Effersøesgøta 30, FO-100 Tórshavn, Tel 31 18 64, Fax 31 72 78, industry@industry.fo, www.industry.fo

www.sansir.fo




# Liðkappingar av bakkastokki

**Í vikuskiftinum løgdu telvarar til brots í FM-liðkappingini 2004/2005. Føroyingar í bestu donsku deildini vóru somuleiðis í eldinum við góðum úrslitum**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Hans Kristian Simonsen tykist fullur av sjálvsáliti eftir væl eydnaðu OL-kappingina*

Havnarmenn og kollfirðingar vunnu seg fram í oddin eftir sigrar í fyrsta umfarinum í FM-liðkappingini. Í Havn møttu toftamenn upp uttan sterkasta kortið, Jens Kristian Hansen. Wenzil Højgaard mannaði tí fyrsta borðið. Kortini megnaðu toftamenn at skava eitt stig saman Aldursmunurin millum veteranin Jústines Hansen og unga talentið Helgi D. Ziska, ið hittust á 3. borði, er yvir 60 ár! Úrslitið varð javnleikur.

Kollfirðingar vunnu væntaðan sigur á hvalvíkingum, 3-1. Hans Kristian Simonsen tykist at halda stimanum eftir OL. Hann vann nevnliga á Finnbjørn Zachariassen. Martin Brekká vann hvalvíkingum stigið við at vinna á Torbjørn Thomsen.

Bæði vestmenningar og serliga klaksvíkingar vóru skerdir í dystinum teirra millum. Klaksvíkingar - uttan Eyðun Nolsøe, Ólavur Simonsen, Steintór Rasmussen og Rana Nolsøe - vunnu 2,5 - 1,5. Finnbjørn Vang leikti javnt móti John Rødgaard. Rani Baldursson avgjørdi dystin á 4. borði, tá hann vann á Jón Mikkelsen.

## Frálík kappingarbyrjan

Talvfelagið Føroyar, sum er í talvelituni í Danmark, leikti sínir fyrstu tveir dystir í ´skakliguni` um vikuskiftið. Í mun til kappingarárið í fjør, eru Eyðun Nolsøe og norski stórmeistarin Einar Gausel ikki við á liðnum. Av fíggjarligum orsøkum bar ikki til at halda fast í Gausel. Eyðun verður helst at síggja á klaksvíksliðnum í vetur.

Telvað varð dupultumfar í Århus. Leygardagin hittu vit uppflytararnar Nordre, eitt sigursvant felag úr Århus. Vit ætlaðu okkum sigurin, men úrslitið varð 4-4. Eitt skiftið høvdu vit fyrimun á flest øllum borðum, men javnleikur var kanska rætta úrslitið. Nikolaj Borge, Flóvin Tór Næs og Carl Eli N. Samuelsen vunnu. Heini Olsen og Martin Poulsen, sum steðgaði á í Danmark eftir talvolympiaduna, leiktu javnt, meðan John Arni Nilssen, Heini Danielsen og Terji Petersen taptu.

Sunnudagin lá ikki fyri hjá Nikolaj at telva og tí vórðu boð send eftir eykaleikaranum Pól Martin Hansen.

Mótstøðuliðið Skolerne, Århus, hava mist nakrar stuðulsleikarar, men vóru kortini sterkari enn vit á øllum borðum. Tí var 5-3 sigurin hjá okkum í roynd og veru eitt lítið bragd og sjálvandi eisini sera kærkomin. John Arni stutt sagt niðurspældi sterka altjóða meistaran Karsten Rasmussen á fyrsta borði. Danin kundi lagt kongin eftir einans 15-20 leikum, men treiskaðist eitt sindur aftrat. Flóvin, Martin, Carl Eli og Terji Petersen vunnu eisini síni talv, meðan Heini O., Heini D. og Pól Martin taptu.

Úrslitið viðførir, at føroyska liðið er á triðja plássi við 9 stigum. Triðja umfar verður 5. desembur og tá verður mótstøðuliðið Helsingør, sum yvirraskandi er á 2. plássi. Fremstir eru meistararnir Helsinge.

**Úrslit og støður:**

**1. umfar**

| | |
|---|---|
| Vestmanna - Klaksvík | 1,5 - 2,5 |
| Havnin - Toftir | 3-1 |
| Kollafjørður - Hvalvík | 3-1 |

**Støðan:**

| | |
|---|---|
| Kollafjørður | 3,0 |
| Havnin | 3,0 |
| Klaksvík | 2,5 |
| Vestmanna | 1,5 |
| Toftir | 1,0 |
| Hvalvík | 1,0 |

**Skak-ligan 1. umfar:**

| | |
|---|---|
| Brønshøj - SK 1968 | 2,5-5,5 |
| Helsinge - K41 | 7,5-0,5 |
| TF Før. - Nordre | 4,0-4,0 |
| Helsingør - Skol. | 4,5-3,5 |

**2. umfar:**

| | |
|---|---|
| K41 - Brønshøj | 2,5-5,5 |
| SK 1968 - Helsinge | 2,5-5,5 |
| Nordre - Helsingør | 2,5-5,5 |
| Skolerne - TF Før. | 3,0-5,0 |

Støðan:

| | |
|---|---|
| 1. Helsinge | 13,0 |
| 2. Helsingør | 10,0 |
| 3. TF Føroyar | 9,0 |
| 4. SK 1968 | 8,0 |
| 5. Brønshøj | 8,0 |
| 6. Nordre | 6,5 |
| 7. Skolerne | 6,5 |
| 8. K 41 | 3,0 |




Leiðari til Serstovnadeildina

## Kanst tú leiða eitt sterkt lið

Tú ert áhugaður í korunum hjá menningartarnaðum í Føroyum. Tú hevur visjónir og evnini at leiða eitt sterkt lið av leiðarum. Tær dámar at bróta upp úr nýggjum, og tú megnar at gjøgnumføra broytingar

Ljóðar hetta sum tú? So er starvið sum leiðari fyri Serstovnadeildina kanska nakað fyri teg. Serforsorgarøkið stendur fyri broytingum, bæði á fakliga og fyrisitingarliga økinum, og tað krevur eitt gløgt høvd, analytisk evni og gott yvirlit.

Serstovnadeildin er skipað undir Heimarøktini og Serforsorgini. Hon fevnir um bústovnar, sambýli, verkstaðir og virknistilboð til vaksin menningartarnað. Virksemið er kring alt landið, og leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum fyri Heimarøktini og Serforsorgini.

Serstovnadeildin umsitur fyri 80 milliónir krónur árliga, og tær fara til at reka 26 stovnar. 209 starvsfólk starvast í serforsorgini, og leiðarin fyri serstovnadeildina arbeiðir í tøttum samstarvi við 24 stovnsleiðarar, sum bygnaðarliga eru undir honum. Umframt Serstovnadeildina eru fýra aðrar deildir undir Heimarøktini og Serforsorgini, og tí gongur leiðarin inn í eitt kollektiv av leiðarum.

Serstovnadeildin skal broytast og bygnaðurin betrast. Leiðarin má tískil hava hegni og evni at koma fram til framtíðarloysnir og fremja tær í verki. Tað krevur millum annað, at tú dugir at skapa sambond og varðveita tey. Tú skalt vera savnandi og skapandi, tí einki verður framt uttan samstarv við onnur.

Serstovnadeildin er eitt dynamiskt arbeiðspláss, har eingin dagur er eins. Økið hevur stóran almennan áhuga, og tað er ein avbjóðing at liva upp til krøvini við teimum fíggjarligu kørmum, sum politiska skipanin setir. Tú fært ávirkan, kemur í samband við nógv fólk og hevur góðar møguleikar fyri eftirútbúgving.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving og starvsroyndir. Lønin hevur verið flokkað á 49. stigi í lønaravtaluni hjá Føroya Pedagogfelag.

Umsóknarfreistin er mánadagin 22. november 2004, og starvið verður sett sum skjótast. Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

Heimarøktin og Serforsorgin
Att: Mary í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Eirargarður 2, 2. hædd, Tel 304020, Fax 304010

www.sansir.fo